

Nú feira vit longu pappírsbrúdleyp, so her kemur myndin, sum øll hava bíða eftir. Takk til familjuna, sum kom til Svøríkis at halda dagin við okkum tann 22. juli 2006.
**Anker og Ann-Kirstin Dýrdarklett Hansen**



Vit takka hjartaliga øllum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 30. desember 2006.



**Til gullbrúðarparið Mariu og Ingibjarta.**
Vit takka fyri alt tit hava verið fyri okkum og allar tær góðu løturnar, vit hava havt saman. Vit gleða okkum til veitsluna leygarkvøldið.
Kærar heilsanir
**Børn, svigarbørn, ommu og abbabørn**

# TILTØK

**Gudstænastur**
**7. s. e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Bjarni Bæk
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Kirkjubøur:*** kl. 12.15, Heri Joensen
***Vestmanna:*** kl. 11, Marjun Bæk, altargongd
***Kvívík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen.
Útvarpsgudstænasta. Magni Christiansen luttekur
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Klaksvík:*** kl. 11, Niels Pauli Danielsen, altargongd
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10, Magnus Brahé Jørgensen
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30: Magnus Brahé Jørgensen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11, Jógvan Fríðriksson
***Selatrað:*** kl. 17, altargongd, Jógvan Fríðriksson
***Eiði:*** kl. 11 messa Emil Olsen
***Skúvoy:*** kl. 12, Jákup R. Hansen, altargongd.
Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
***Svínoy:*** kl. 12, Elsa Funding, altargongd

**Katólska kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ Christian Noval, presti í Mariukirkjuni.
Mánakvøldið 23. juli kl. 19.30: Fyrilestur við Christian Noval, presti í Mariukirkjuni.
Fyrilestur verður á enskum.
»Revelation – day of judgement or the present time?«
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 22. juli kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Sverri Steintún, talar.
Broytingar í vanligu møtitíðunum sunnudagar:
Í summarfrítíðini er eingin sunnudagsskúli og einki møti kl. 12.
Morgunmøtið verður longt við uml. hálvan tíma.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Sunnudagur 22. juli kl. 19.00: Møti. Bønar- og samtaluløtu.

**Frá Frelsunarherinum Tórshavn**
Sunnudagin: Møti kl.11.00.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími.
Kl. 11 gudstænasta Elly og Laila Nielsen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mánakvøldið 23. juli kl. 20 bønarmøti.
www.gospel.fo

**Ebenezer**
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/Jóhan P. Johannesen
Mánadagin kl 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti:
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Aksel Jacobsen, Barbara Petersen syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Sunnudagin kl. 10.45 Møti - Anna Guttesen talar.
Mánadagin 23. juli kl. 20.00 bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti. Øll eru vælkomin.

**Avhaldshúsið í Haldarsvík**
Vikuskiftismøti verða leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00.
Hesi luttaka við talu, sangi og vitnisburði: Thomas J. Askham, Sigfred Johannesen, Hjalgrím Davidsen, Hans P. Højgaard, Solveig og John Joensen, Magda Solmunde og Meibritt Berg.
Sunnukvøldið er innsavnan til arbeiðið í Rumenia.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Einki møti sunnukvøldið.
Møtini byrja aftur 5. august.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Útimøti verður sunnudagin kl. 16 á Stakka.

**KEDRON í Sørvági**
***Alt summar frá nú av og fram til sunnudagin 5.8.2007, verður skráin hendan.***
Sunnudagar: Breyðbróting við læru kl. 11.00.
Onki Evangeliskt møti kl. 18.00.
Mikudagar Bønarmøti kl. 20.00.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Ingibjørn Royðutoft o.fl.
Sunnudagin kl. 11, Morgunmøti við við Elstaráðnum.
PREP-skeið fyri hjún verður í Kelduni í september. Til ber at tekna seg á tlf 442054 ella 581512. Meira fæst at vita á www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 20. juli kl. 21.00: Ungdómsmøti v/ luttøku av føroyskum og donskum næmingum frá Børskop bíbilskúlanum.
Sunnudagur 22. juli kl. 18.00: Møti v/ heimligum kreftum
Mikudagur 25. juli kl. 20.00: Bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.10.30: Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 19 verður møti við Petur A. Jacobsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19**
Ungdómsmøti fríggjakvøldið er avlýst
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn
Sunnudagin kl.11.00 er møti v/ Poul Nicolai Steinberg
Hvønn gerandismorgun kl.6:45 er morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, Petur Poulsen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00: Mønarmøti.
Hjartaliga vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Alfred Petersen og Dánjal Andreasen. Ymiskar sangkreftir luttaka. Innsavnan til húsið. Øll eru vælkomin

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl.6 møti við Katrin Mortensen, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardag kl. 15.00: Andakt í sambýlinum í Hvalba.
Sunnudag kl. 11.00: Halgunarmøti við Magrethu og Heidi.
Kl. 18.00: Evangeliskt møti við "Teen Mission" frá USA.
www.frelsunarherurin.fo

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 verður møti v. Hilmar Bech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, útferð**
Sunnudagin 22. juli verður útferð til Skúvoyar. Farið verður við Teistanum av Gomlurætt kl. 9.45. Leið 101 ferð av Farstøðini kl. 9.20. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425, avmarkað luttøku.

**Felagið Tórshavn, spákingartúrur**
Týskvøldið 24. juli verður gingið fram við Stóragarð. Byrjað verður Yviri við Strond við Tórgarðsgøtu.

**Gongutúrur**
*í Lambardal og Kvívíkskornøvu*
Útferð í Lambardal og út í Sund, vit møtast á keiini í Sørvági kl. 14:00.
Ferðaleiðari er við á túrinum.
Havið góð klæðir og matpakka við.
Túrurin er miðal.
Tilmelding á tlf. 333455
*Vága Kunningarstova*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið er **stongt** frá 1. juli til 27. juli.
**ÓLAVSØKAN:**
Miðhæddin: 27.-31. juli kl. 16 til 20: Listaframsýning hjá Frits Johannesen
Kjallarin: 28.-30. juli kl. 16 til 20.
Søla av bundnum pløggum, drekkamunni og pannukøkum
Miðhæddin: 28. juli kl. 17.30 til 18.30: Kór úr Prag og Havnarkórið. Kl. 19 til 20.00: Sogndal Songlag.
29. juli kl. 16 til 17.00: Kór úr Prag og Havnarkórið.
Tilhaldið er stongt frá 1. aug. til 17. aug.
Vit ynskja øllum eitt gott summar.

**Landsfelag Pensjónista**
***Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá týsdegnum 26.6.2007.***
***Opið verður aftur týsdagin 31.7.2007.***
Landsfelag Pensjónista
Tróndargøta 13
100 Tórshavn
tlf. 319394/219394

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava summarferiu, byrja aftur í august.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
***Tilhaldið fer nú í summarsteðg og byrjar aftur 4. sept.***

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.